TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar skúlaárið 2004/2005

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1998 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 26. ella 27. januar 2004.

**Innskrivingin**
í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 26. og týsdagin 27. januar, báðar dagarnar frá kl. 15-18. Havið dópsnavnabræv við.**
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
í býráðssalin somu tíð tlf. 254010

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/ børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. Flokk.

**Hoyvíkar skúli**
Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **mánadagin 26. januar kl. 16 seinnapartin.** Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til Frítíðarskúlan í Snarskivuni, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 315160.

**Meiri fæst at vita**
um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, deildarleiðara, tlf. 315160.

**Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar**



## Pedagogur
### til Frítíðarskúlan í Fuglafirði

Frítíðarskúlin í Fuglafirði søkir eftir 1. pedagogi 30 t. viku at byrja 1. mars 2004.

Frítíðarskúlin er ætlaður 52 børnum úr 1. og 2. flokki.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow leiðara á tlf. 227385 ella 444355.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2004, kl. 10.00.

Fuglafjarðar býráð
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 20. januar 2004
**Fuglafjarðar býráð**



## Bilur við skaða til sølu!

Fyri P/F Trygd selja vit ein 4-hjólstrektan Toyota Rav 4 við skaða.
Árg.: Januar 2003
Motorur: 2,0 Turbo Diesel
Km.: 27.000

Bilurin verður seldur fyri hægsta boð yvir Kr. 40.000,- sum hann stendur við skaða.




**P/F Reyni Service**
Bilasølan
Tlf. 353040



## Umboðsmannaval!

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til Umboðsmannaval mikudagin 18. februar 2004.

Veljast skulu 3 umboð.

1 fyri Haldarsvík
1 fyri Tjørnuvík
1 fyri Saksun

Uppskot skulu vera sjúkrakassanum í hendi 3. februar 2004.

**Eiðis Læknadømis Sjúkrakassi**
FO-430 Hvalvík



## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff



FØROYA PEDAGOG FELAG

## Aðalfundur 2004

Aðalfundurin verður á Hotel Føroyum

**leygardagin 28. febr. 2004 - kl. 15.00**

Skrá:
Smb. viðtøkum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7. febr. 2003

**Nevndin í Føroya Pedagogfelag**



FØROYA LANDSSTÝRI

**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

## Fiskivinnugransking søkir samskipara

Fiskimálaráðið tók í 2001 avgerð um at skipa granskingarjáttanina, *Fiskivinnuroyndir*, í greiðari karm. Samstundis varð avgerð tikin um at kanna á hvørjum økjum og hvussu *fiskivinnugransking* kundi verða ment í Føroyum. Verandi samskipari fer í annað starv og verður starvið tí leyst at søkja.

**Arbeiðið sum samskipari er sera avbjóðandi og fjøltáttað:**

- Arbeiðið fevir um at samskipa arbeiði í Fiskivinnuroyndum. Tað snýr seg um skipa málviðgerðina av umsóknum, taka stig til tiltøk, sum birta undir granskingar og menningarvirksemi og miðling av úrslitum.
- Arbeiðið fevnir eisini um at samskipa granskingarvirksemið, sum verða játtað av játtanini til granskingarætlanir. Í løtuni er hetta skipað í kjarnar: ein fyri reiðskaps/fiskitøkni, ein fyri lívtøkni og ein fyri framleiðslutøkni.
- Somuleiðis skal samskiparin taka stig til samstarv í Føroyum og uttanlands, sum kann styrkja gransking og menning innan fiskivinnusektorin í síni heild.

Arbeiðið verður stýrt av einum stýrisbólki við umboðum frá Fiskimálaráðnum, Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Menningarstovuni, Ráfiskakeyparafelagnum og Ráfiskaseljarafelagnum.

**Vit vænta av tær :**

- At tú kannst arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.
- At tú hevur neyðugan og viðkomandi akademiskan førleika
- At tú hevur fyrisitingarligar royndir.

Arbeiðið sum samskipari verður sett fyri eitt 3 ára skeið. Tann, sum verður settur, skal tola broytingar í starvsinnihaldi og -formi, serliga við atlitið til tann skipanarliga form fiskivinnugranskingin kemur at taka framyvir.

Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millm avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 20. februar 2004.

Eru spurningar ber til at venda sær til Hjalta í Jákuppstovu tel 353900 ella hjaltij@frs.fo

Umsóknir við avritum av viðkomandi próvskjølum, arbeiðsroyndum (CV) skal sendast til:

**Stýrisbólkin fyri Samskiparan í Fiskivinnugransking**
Att: Hjalti í Jákupsstovu
Fiskirannsóknarstovan
boks 3051
FO 110 Tórshavn



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið í Norðasta Horni**
Í býlingshúsinum ganga 49 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum eru 10 starvsfólk.

**Býlingshúsið Undir Brúnni**
Í býlingshúsinum ganga 47 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum starvast 11 fólk .

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið í Norðasta Horni eftir:**
- einum pedagogi 40 tímar um vikuna í barnagarðsstovuna Innistova at byrja 1. mars 2004 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna í barnagarðstovuna Uppistova at byrja 1. apríl 2004 ella eftir nærri avtalu.

Leiðari Óli Midjord, tlf. 310905
Granagøta 5
FO 100 Tórshavn

**Býlingshúsið Undir Brúnni eftir:**
- einum fólki at arbeiða í køki 20 tímar um vikuna. Starvið verður sett 20. februar 2004 ella eftir nærri avtalu.

Leiðari: Turið Horn, tlf. 31 91 80 ella 22 29 05
Smærugøtu 9b
FO 100 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. februar 2004.



**Sp/f Andersens Beding**

## Beding og maskinverkstaður

- Upphálingar av bátum upp til 30 BRT.
- Allar umvælingar av jarn, træ og glastrevjabátum
- Søla, íseting og umvælingar av motorum/gearum v.m
- Alt arbeiði innan rustfrítt og aluminium.
- Alt arbeiði innan HVS.
- Kavara til at skera av skrúvu v.m.



**Prísdømi:**
**nannidiesel 130 HK við ZF 45A hydr. geari**
**122.500 við MVG**

nannidiesel
Bátamotorar frá10 til 320 HK.
- Ljóðleysir
- Reinir
- Álítandi

**Sp/f Andersens Beding**
FO-490 Strendur
TEL 44 89 87 / 22 27 18
beding@post.olivant.fo
www.nannidiesel.com



# GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
# Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
# Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045


i
Sosialurin